# Føroya Tele telur skeivt

*Er tín telefonrokning ov stór? Tað nýtist ikki at vera, tí at tú hevur tosað ov nógv. Brek er á taksteringsskipanini hjá Føroya Tele, og tað hevur havt við sær, at summir brúkarar hava goldið okursprís farna hálva árið.*

JÁKUP MØRK
& RÚNAR REISTRUP

Brek á taksteringsskipanini hjá Føroya Tele hevur havt við sær, at føroyskir telefonfelagar í longri tíð hava goldið alt ov nógv fyri samrøður til føroyskar fartelefonir staddar uttanlands.

Hóast Føroya Tele varð gjørt varugt við trupulleikan, millum annað fyri trimum vikum síðan, hevur telefyritøkan ikki gjørt viðskiftafólk síni varug við brekið. Hetta hóast hugsandi er, at tað hevur havt við sær, at heilt nógv viðskiftafólk hava goldið ov stórar telefonrokningar farnu mánaðirnar - og kanska farnu árini, orsakað av brekinum.

Enn ikki stjórin á Føroya Tele, Andras Róin, hevði fingið nakað at vita um brekið á taksteringsskipanini, fyrr enn Sosialurin setti seg í samband við hann í gjár. Hetta hóast Føroya Tele longu fyri trimum vikum síðan gav tveimum brúkarum endurgjald tí teir høvdu goldið ov nógv í telefonrokning orsakað av brekinum við taksteringsskipanini.

Nú kannar Føroya Tele, hvussu nógvir telefonfelagar hava goldið ov nógv orsakað av brekinum, og hvussu stórar upphæddir talan er um.



*Brek á takseringsskipanini hjá Føroya Tele hevur við sær, at telefonfelagar verða dupulttaksteraðir fyri samrøður til fartelefonir uttanlands. Tað hevur verið ein dýr søga fyri summi.*

**Modelmynd: Álvur Haraldsen**

### 2000 krónur ov nógv

Sosialurin hevur fingið hendur í útgreinaðar telefonrokningar frá einum telefonfelaga, ið fyri stuttum fekk nærum tveytúsund krónur í endurgjaldi frá Føroya Tele. Hetta eru pengar, ið felagin hetta farna hálva árið hevur goldið ov nógv í telefonrokning vegna brekið í taksteringsskipanini hjá Føroya Tele.

Telefonfelagin gjørdist sjálvur varugur við, at telefonrokningin var nakað stór, og bað tískil um at fáa útgreinaðar rokningar fyri farna hálva árið, har hvør einasta samrøða var skrásett.

Av hesum útgreinaðu rokningum sæst, at telefonfelagin hevur goldið okurspris, tá viðkomandi hevur ringt til føroyskar fartelefonir staddar uttanlands.

Sosialurin er vitandi um eitt annað dømi, har ein telefonfelagi hevur fingið yvir tveytúsund krónur í endurgjaldi vegna sama brek.

### Feilurin

Ringir tú til eina føroyska GSM fartelefon, ið er stødd uttan fyri Føroyar, eigur tú kortini bert at gjalda vanligan telefontakst, ið er galdandi tá tú ringir til GSM fartelefonir í Føroyum.

Tann, ið eigur føroysku fartelefonina, skal so gjalda tað, ið tað kostar at ringja til landið, hann er staddur í. Er fartelefonfelagin til dømis staddur í Englandi, og ein telefonfelagi í Føroyum ringir til hansara, skal fartelefonfelagin altso gjalda tann minutttakst, ið er galdandi millum Føroyar og England. Telefonfelagin, ið ringir, skal bert gjalda minutttakstin, ið vanliga er galdandi fyri samband við føroyskar fartelefonir.

### Dupulttaksterað uttanlandssamrøður

Men á útgreinaðu telefonrokningunum sæst, at tá telefonfelagin hevur ringt frá síni fastnet telefon til eina føroyska fartelefon í Svøríki, hevur hann bæði goldið vanligan GSM telefontakst og goldið galdandi minutttakst millum Føroyar og Svøríki. Hesin takstur er 3 krónur og 95 oyru.

Ein telefonsamrøða til føroysku fartelefonina í Svøríki, ið vardi í 14 minuttir og 44 sekund átti bert at kosta felaganum 20 krónur og 63 oyru, men av tí at felagin eisini varð takseraður við minuttprísinum millum Føroyar og Svøríki, kostaði hendan samrøðan honum 78 krónur og 83 oyru, ella kr. 58,20 meira enn hon av røttum átti at kostað.

Tann, ið eigur viðkomandi føroysku fartelefon, ið varð stødd í Svøríki, hevur eisini goldið uttanlandstakstin á kr. 58,20. Talan er sostatt um at Føroya Tele hevur dupulttakserað hesa samrøðuna vegna brek á taksteringsskipanini.

### Eisini til Noregs

Hetta er bara eitt av dømunum um okurstakstering í útgreinaðu telefonrokningunum, ið Sosialurin hevur fingið í hendi.

Á somu telefonrokningum sæst, at tá sami felagi hevur ringt til eina føroyska fartelefon stadda í Noregi, er hann eisini blivin takseraður við minuttprísinum millum Føroyar og Noreg, so talan er ikki um ein trupulleika, ið bert kemur fyri í samrøðum til telefonir staddar í Svøríki. Hinvegin er einki í útgreinaðu telefonrokningunum, ið bendir á, at yvirtakstering fer fram tá ringt verður til føroyskar fartelefonir í Danmark.

### Stjórin visti einki

Stjórin á Føroya Tele, Andras Róin, var ikki varugur við trupulleikan, tá Sosialurin ringdi til hann fyrrapartin í gjár.

Men eftir at hava kannað málið var tað greitt fyri stjóranum, at onnur í fyritøkuni vistu um og vóru í ferð við at kanna, hvussu umfatandi okurstakseringin av telefonfeløgum hevur verið.

– Vit kenna til trupulleikan við taksteringsskipanini, men hetta er nýtt fyri okkum, og tí vita vit ikki, hvussu umfatandi trupulleikin er. Men tað er greitt, at dupulttakstering er farin fram í summum førum, sigur Andras Róin, stjóri á Føroya Tele.

### Brekið enn ikki funnið

Sambært útgreinaðu telefonrokningunum, ið Sosialurin hevur fingið hendur á sæst, at trupulleikin við taksteringsskipanini hevur havt við sær at dupulttakstering javnan er farin fram síðan fyrst í januar mánaði og heilt fram til endan á juli mánaði.

Longur aftur strekkja útgreinaðu rokningarnar seg ikki, og tí er væl hugsandi at hesin trupulleikin hevur kostað telefonfeløgum eyka í enn longri tíð.

Av Føroya Tele kundu tey í gjár ikki geva trygd fyri, at trupulleikin við dupulttaksteringini er bastur sum er. Tí er hugsandi at telefonfelagar enn gjalda okursprís fyri samrøður við føroyskar fartelefonir, ið eru staddar uttanlands.

Stjórin á Føroya Tele torir tó at lova viðskiftafólkum sínum, at hava tey goldið ov nógv, so fáa tey peningin endurgodnan.

– Vit kunnu ikki liva við at vit hava sent fólki skeivar rokningar. Tað mugu vit fáa greiðu á og so rætta skeivleikaranar, segði Andras Róin, stjóri á Føroya Tele í gjár og vísti ikki aftur møguleikunum at senda útgreinaðar rokningar út til øll viðskiftafólkini, so tey sjálvi kunnu kanna, um tey hava goldið ov nógv fyri telefonsamrøður sínar.

# Farodane keypt VIT og in.fo

*KT fyritøkurnar VIT og in.fo vórðu fríggjadagin báðar tvær uppkeyptar av Farodane, ið eftir hondini hevur eitt breitt virksemi, millum annað innan KT.*

RÚNAR REISTRUP

Ein tann mest lovandi føroyska fyritøkan innan kunningartøkni, trý ára gamla VIT, varð uppkeypt av Farodane fríggjadagin.

Við í keypinum fylgdi eisini internetfyritøkan in.fo, ið hevur ment og rikið internetportalin við sama navnið síðan fyrst í mei mánað í ár. Eigararnir handan in.fo eru at kalla teir somu sum standa aftan fyri VIT.

Sum vera man ber ikki til at fáa uppspurt hvat fyritøkurnar báðar hava kostað Farodane, men helst er talan um ein rættiliga góðan prís. Ólavur Olsen, stjóri á Farodane, sigur, at keypið av VIT og in.fo fyrst og fremst umfatar keypið av teirri vitan, sum starvsfókini liggja inni við. Harnæst hevur VIT góð viðskiftafólk og eitt navn, sum er rættiliga kent og virt.

Ætlanin er, at fyritøkurnar VIT og in.fo skulu halda áfram at koyra sum sjálvstøðugar fyritøkur í hvussu er fyribils.

### Sama virkisøki

Fyritøkan VIT fæst í høvuðsheitum við tríggjar vinnugreinir innan KT vinnuna. Hesar eru skeiðtænasta, netumsitingartænasta og framleiðsla av ymsum software so sum webloysnum og serforritum.

Hetta eru allar vinnugreinar, sum Farodane longu fæst við, og tí slepst ikki undan at umskipa virksemið í fyritøkununum báðum eftir keypið.

Ólavur Olsen, stjóri á Farodane, væntar at millum annað skeiðtænastan hjá Farodane, ið kallast Kvasir, og skeiðtænastan hjá VIT helst verða lagdar saman í eitt um ikki so langa tíð.

Fyrst skal tó alt fáast frá hondini, sum VIT hevur á skránni restina av árinum.

### Farodane breiðir seg

Ólavur Ellefsen var stjóri og høvuðspartaeigari í VIT og in.fo. Hansara partur er allur seldur til Farodane, og hann er tískil púra leysur av báðum fyritøkunum nú.

Nýggjur stjóri á VIT er Óli Olsen, sum higartil hevur verið leiðari sokallaðu menningardeildini hjá VIT.

Eftir søluna eru eigaraviðurskiftini í VIT soleiðis, at starvsfólkið á fyritøkuni eigur tilsamans 20 prosent av partapeninginum, meðan Farodane eigur hini 80 prosentini.

Fyri tveimum árum síðan keypti Farodane helvtina av KT fyritøkuni Vision Software, og fyrst í hálvfemsunum varð T-Mac, ið fyrst og fremst seldi teldur og kopimaskinur, keypt og integrerað í Farodane.



# Umbyggja verksmiðjuna á Næraberg

**Klaksvík:** Hóskvøldið kom Næraberg til Klaksvíkar við 682 tonsum av surimi og 190 tonsum av mjøli.

Hendan veiðan verður løgd upp hjá Northern Fish Cold Storage, har hon verður løgd á goymslu.

Næraberg fór avstað 31. mai, men hann hevur verið inni tvær ferðir síðani og landa mjøl. Samlaða veiðan fyri hendan túrin er tí 455 tons av mjøli, umframt tey 682 tonsini av surimi.



### Størri orku

Tá veiðan er løgd upp í Klaksvík, fer Næraberg til Noregs, har hann skal umvælast á Aukra skipasmiðjuni. Verksmiðjan skal útbyggjast, so hon kann arbeiða meira fisk.

Tað mesta, sum verðandi verksmiðja hevur arbeitt í ein dag, er 42 tons, men tá var talan um stóran fisk. Ætlanin er, at verksmiðjan í framtíðini skal klára eini 50 tons av smærri fiski.

62 fólk vóru við Næraberg hendan túrin, og ætlanin er, at skipið skal aftur til fiskiskap 1. oktober.

**ek**





Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið
*5 ferðir um vikuna.*

| |
|---|
| Navn: |
| Búst.: |
| Postnr., bygd, býur: |
| Tlf.: |
| Undirskrift: |

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.


# Nógvar útlendskar vitjanir

*Tað hevur verið ovmikið at gera á Kunningarstovuni í Klaksvík í summar*

**Klaksvík:** Kunningarstovan í Klaksvík hevur havt nógvar útlendskar vitjanir í summar. Fólk koma á gátt fyri at vita, hvat tey kunnu fara til í norðoyggjum.

- Í ár hevur Svínoyggin verið best umtókt, men nógv fólk hava eisini verið í Fugloynni og á Kalsoynni, sigru Emma Heinesen, leiðari av Kunningarstovuni.

Stóra takið hjá ferðavinnuni í Norðoyggjum hevur verið síðani 12 juli, tá góðveðrið rættiliga byrjaði.

- Eftir tað streymaðu fólk til Norðoyggjar, og tað er ikki fyrr enn nú, at tað er minkað eitt sindur. Men tað koma framvegis ferðafólk hendanvegin, og eg veit um fleiri bólkar, sum eru á veg, sigur Emma Heinesen.

### Hugtikin av náttúru

Tað eru serliga danir, sum vitja í Norðoyggjum, men í ár hevur eisini fitt av fólki verið úr Sveis, og onkrar meira forkunnugar vitjanir úr Japan hava eisini verið.

- Fólk eru ótrúliga hugtikin av náttúruni. Vit kunnu ikki bjóða náttarlív og handilslív sum í útlondunum, men vit hava eina náttúru, sum er nakað heilt serligt, sigur Emma Heinesen.

Kunningarstovan í Klaksvík hevur havt opið fýra dagar um vikuna, men virksemið hevur eisini verið uttan um vanligu upplatingartíðirnar.



# Polarstjørnan nýggja brúgv

*Arbeiðið líður væl, og væntandi fer línubáturin aftur til fiskiskap í næsta mánaði*

**Klaksvík:** Seinastu tveir mánaðirnar hevur Polarstjørnan ligið við bryggju í Klaksvík. Hesa tíðina hevur verið arbeitt við at skifta brúnna út.

Arbeiðið er nú komið væl ávegis, men tað gongur helst ein mánaði afturat, áðrenn Polarstjørnan fer til fiskiskap.

Við nýggju brúnni verða umstøðurnar umborð munandi betraðar. Nýggj tól verða á brúnni, og millum annað fær manningin eina nýggja messu.

14 mans eru við Polarstjørnuni, sum væntandi fer fyrsta túrin til Íslands, har nakað av kvotu er eftir at fiska. Polarstjørnan hevur eisini nakrar fiskidagar eftir á Føroyabanka.

**ek**




*Polarstjørnan hevur fingið nýggja brúgv*